

## Breti tikin av døgum í Kina

Hóast mótmæli frá bretsku myndugleikunum er bretski ríkisborgarin Akmal Shaikh tikin av døgum í Kina, har hann var dømdur til deyða fyri rúsevnasmugling. Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, sigur, at hann er skelkaður av upplýsingunum um, at deyðadómurin er fullførdur. Bretska stjórnin og stuðlar hjá Sheikh vildu vera við, at maðurin var sálarliga sjúkur, og at hann bleiv lumpaður til at smugla rúsevni til Kina fyri tveimum árum síðani. Men hesum lurtaðu teir kinesisku myndugleikarnir ikki eftir. Akmel Shaikh er tann fyrsti evropearin, sum er tikin av døgum í Kina síðani 1951.

## Obama bjóðar av

Amerikanski forsetin, Barack Obama, var sera avgjørdur, tá hann í gjárkvøldið gjørdi viðmerkingar til tilburðin, tá ein maður úr Nigeria ætlaði at spreingja eitt amerikanskt flogfar, beint áðrenn tað skuldi seta seg í Detroit. Obama segði, at tey, sum drepa ósekar amerikanarar, skulu vita, at USA fer ikki bara at verja seg betur, men er eisini til reiðar at taka onnur stig. Eygleiðarar siga, at orðini kunnu vera ein ábending um, at USA fer í hernað við eina grein av al-Qaeda, sum heldur til í Jemen. Umframt Jemen nevndi forsetin beinleiðis Pakistan, Afghanistan og Somalia.

# Kringvarpið fær ókeypis útvarpssignal í tunlar

**Av tí at Kringvarp Føroya verður nýtt sum tilbúgvingarrás, rindar Landsverk fyri útgerð sum ger, at útvarpið hjá Kringvarpinum hoyrist í tunlungum kring landið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*- Tá ið Kringvarp Føroya tilbúgvingarútvarp, og tá tað almenna fammanundan hevur ábyrgdina av sendinetinum og fíggjar tað, er heilt natúrligt, at tað almenna eisini fíggjar sendinetið í tunlunum, sigur Annika Olsen*

- Endamálið við sendinetinum í tunlunum er, at netið verður nýtt til tilbúgvingarrás, sum politiið kann bróta inn á, tá ið hetta er neyðugt, sama hvørji rás, ið lurtað verður eftir. Harafturat verður netið brúkt til samskiftið hjá sløkkiliðum og sjúkrabilum í og út úr tunlunum.

Hetta sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum í svari til Sjúrð Skaale, sum hevur sett henni ein sokallaðan grein 52 spurning, har hann spyr, um Landsverk ger mun á Kringvarpi Føroya og privatum útvarpsrásum í sambandi við útvarpssignal inni í tunlum.

### Landsverk ger sum norðmenn

Annika Olsen sigur, at Landsverk fylgir teimum normun, sum eru galdandi í Noreg.

- Eftir hesum verður ein sendikaðal lagdur í tunnilin og sendari knýttur at. Fyri at bilførarar skulu hava útvarpstólið tendrað, er neyðugt at okkurt verður sent. Í Noregi er tað almenna útvarpsrásin KNR, sum er tilbúgvingarrásin. Fyri hesa skyldu fær KNR tann fyrimun, at teirra sendinet verður víðkað inn í tunlarnar, sigur Annika Olsen.

Hon sigur víðari, at í Føroyum er Kringvarp Føroya tilbúgvingarrás, og uttan fyri tunlarnar er tað Mentamálaráðið, altso tað almenna, sum hevur fíggjað sendinetið. Í sambandi við tunlarnar hevur Landsverk fíggjað sendaran.

- Landsverk hevur boðið hinum privatu útvarpsrásunum at seta upp sendiútgerð í tunnlunum fyri egnan kostnað og at nýta antennuna, ið hoyrir til tunnilin ókeypis. Sostatt skulu privatu støðirnar bert gjalda og reka sjálvar sendararnar, og ikki antennuskipanina.

### Tað almenna rindar fyri Kringvarpið

Sjúrður Skaale spyr eisini landsstýriskvinnuna, hvørja heimild tað byggir á, at munur verður gjørdur á privatum útvarpsstøðum og Kringvarpi Føroya í hesum máli.

Til tað sigur Annika Olsen, at eftir lógini um kringvarp hevur Kringvarp Føroya skyldu til at taka lut í almennum tilbúgvingarskipanum.

- Sendarin sum stendur í sambandi við kaðalarnar í tunlum er partur av sendinetinum, og tá ið Kringvarp Føroya hevur nevndu skyldu, og at tað almenna fammanundan hevur ábyrgdina av sendinetinum og fíggjar tað, er heilt natúrligt, at tað almenna eisini fíggjar henda partin av sendinetinum eisini, sigur Annika Olsen, sum tó heldur, at spurningur kanska kann setast við, um tað ikki var rættari, at Mentamálaráðið fíggjaði henda partin, men í síðsta enda er tað landskassin sum rindar, sigur hon.

Viðvíkjandi privatum rásum, sigur Annika Olsen, at tær sítt egna sendinet, sum tað almenna ikki fíggjar.

- Tí er tað ikki natúrligt, at tað almenna skal gjalda fyri at gera og reka net til privatu sendistøðirnar í tunnlunum. Landsverk metir seg harafturat ikki hava heimild til at fíggja útgerð til privatar sendistøðir, uttan so at hetta beinleiðis verður heimilað í fíggjarlógini, sigur Annika Olsen.

Niðurstøðan hjá landsstýriskvinnuni er tí, at privatar rásir hava í boði at nýta sendiútgerðina í tunlunum, so leingi tað ikki førir útreiðslur fyri tað almenna við sær. Hetta merkir, at privatu rásirnar mugu sjálvar rinda fyri ta eykaútgerð, ið ger tað møguligt at senda.

# Sjúkrakassagjaldið verður avtikið hósdagin

**Komandi fríggjadag, tann 1. januar 2010, fáa føroyingar eina nýggja heilsutrygd. Samstundis fer gamla skipanin við sjúkrakøssum og sjúkrakassagjaldi úr gildi**

HEILSUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Hósdagin fara sjúkrakassarnir í søguna, og fríggjadagin 1. januar tekur Heilsutrygd um endan*

Ístaðin fer TAKS at innkrevja gjald til nýggju almennu heilsutrygdarskipanina, sum kallast Heilsutrygd. Gjaldið verður eins fyri øll – 245 krónur um mánaðin, galdandi frá januar 2010. Børn undir 18 ár gjalda einki.

Eftir ætlan verður fyrsta gjaldið kravt inn síðst í februar, tí tað tekur tíð at fyrireika nýggju innkrevjingarskipanina. Síðani verður heilsutrygdargjaldið kravt inn mánaðarliga. Heilsumálaráðið fer at kunna nærri um hetta í næstum.

Um ársskiftið dettur lógarkravda skyldan at vera limur í einum av teimum gomlu sjúkrakassunum burtur.

- Tí skulu fólk ikki longur gjalda til hesar sjúkrakassar, sigur Heilsumálaráðið, sum eisini mælir til at strika møguligar sjálvvirkandi flytingar til sjúkrakassarnar skjótast til ber.

- Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 kemur fyri gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum, sigur Heilsumálaráðið.